
nøvn nú nøvn nú nøvn nú nøvn nú

## Heilsanir



***Góði, allarbesti Rúni***
Eg ynski tær lukku og gleði á tínum 2 ára degi í morgin.
*Heilsan,* ***lítla diddan***
P.S.: Nú mást tú vera góður við meg.



***Góði babba***
Hjartaliga tillukku við 27 ára degnum. Takk fyri alt.
*Heilsan,* ***vit báðar Eva***



***Góða Poula***
Hjartaliga tillukku við 4X ára degnum tann 5. mai. Nú fer at nærkast teimum hálvthundrað.
*Kærar heilsanir,*
***6. fl. í Stranda skúla***



***Eftirlýsing!!!***
Er ongin, sum vil hava meg? Eg fylli 40 ár skjótt og havi ongan maka!!!




Hjartaliga tillukku við tí hvassa horninum 7. í hesum. Vónandi søkkur skútan ikki, hóast rotturnar flýggja. Góða ferð!
*Heilsan,* ***klikan í neðra***



***Góði, elskaði Rúni***
Hjartaliga tillukku á 2 ára degnum 3. mai. Nú ert tú blivin ein stórur drongur.
*Heilsan,* ***mamma og babba***
P.S. Tú mást ikki pína kiskuna meira!



***Góða fastir***
Tillukku við degnum, hvussu nógv var tað? 40? Túsund takk fyri at tú ert so góð við meg.
*Heilsan,* ***Jóan Jákup***



***Góði, fitti Einar***
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum, ið var 4. mai. Kom skjótt norður og spæl við meg.
*Muss og klemm frá* ***Sannu***



***Góði, allarbesti Rúni***
Hjartaliga tillukku á 2 ára degnum tann 3. mai. Nú mást tú ikki gera so illa fortreð.
*Heilsan,* ***stóribeiggi Heiðrikur***



***Maria Christiansen, Leirvík***
Góða Maria, hjartaliga tillukku við tí runda degnum. Ja, onkra stuttliga løtu hava vit havt saman.
*Heilsan,* ***K.J.***



***Góði Kaptein Petur***
Tillukku við hálvthundrað ára degnum 6. mai. Ja, her situr tú so glaður og guffar køkur í teg. Men nær fáa vit nakað at eta?
*Heilsan,* ***vit svongu á Mikkjalstrøð***

### nøvn nú 5 ferðir um vikuna

**20,- kr.**

**GEVIÐ GÆTUR:**
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 20,- kr.
í ❑ frímerkjum, ❑ krossaðum kekki
fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.
Myndaheilsanir, sum eru okkum í hendi við postinum kl. 8 á morgni, leggja vit okkum eftir at fáa í blaðið dagin eftir. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: .....

.....

.....

.....

.....

.....

**MYNDINA AFTUR:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
*Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.*

Sent hevur **(skal fyllast út).**

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»NØVN NÚ«**

## Tiltøk

### Frelsunarherurin, Tórshavn
Í dag kl. 15: Bøn.

### KFUM & KFUK
Várgleði (børn 4-12 ár) er í KFUK týsdag frá kl. 17-18.30.
Teen-klub (ung 13-16 ár) er í KFUM týskvøld kl. 19.
»Vit eta hveiti« í KFUK hóskvøldið kl. 19.30.
Øll eru vælkomin.

### Hvítusunnusamkoman, Tórshavn
*Yvirí við Strond*
Sunnudagin kl. 11: Morgunmøti.
Sunnudagin kl. 12.15: Sunnudagsskúli.
Sunnukvøldið kl. 18: Evangeliskt møti.

### Ebenezer, Tórshavn
Sunnudag kl. 12: Sunnudagsskúli.
Sunnukvøld kl. 18: Evangeliskt møti.
Sunnukvøld kl. 21: Útimøti.
Mánakvøld kl. 20: Bønamøti.
Mikukvøld kl. 20: Uppbyggingarmøti.
Hóskvøld kl. 20.30: Ungdómsmøti.

### Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20.30: Møti.

### Landsstevnan
hjá sjómanskvinnuringunum í Føroyum verður í Leguhúsinum í Nesvík 15.-17. mai.

### Frá Lívsins Orð
Møti verður í kvøld kl. 20, har Poli Jacobsen talar.
Barnamøti verður leygardagin kl. 17.
Møti verður sunnumorgunin kl. 10.30.